# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Á Hetlandi fyri fýra árum síðani var Marius Joensen við í oddinum. Hann er tó burturstaddur á leikunum hesaferð, men vónin er, at drúgva venjingin hjá skjúttunum gevur úrslit á Álandi*

# Rannvá á Álandi umboðar Føroyar

**Millum teir fimm byrsuskjúttarnar á komandi Oyggjaleikunum er Rannvá Eiriksdóttir, sum býr á Álandi. Maður hennara, sum er álendingur, vann gull á leikunum á Rhodos**

BYRSUSKJÓTING
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð hava Føroyar á Oyggjaleikunum á Álandi eina kvinnu við millum byrsuskjúttarnar. Tað er Rannvá Eiriksdóttir, sum er ættað úr Sundalagnum, men búsitandi á Álandi. So hon verður mestsum á heimavølli, kann sigast.

Maður hennara er álendingur, og hann er sjálvur so góður skjútti, at hann vann gull fyri Áland á Oyggjaleikunum á Rhodos fyri tveimum árum síðani. Bæði tvey hava tey verið við í kappingum í Føroyum, tá tey hava vitjað, so tey eru vælkend í føroyska skjótiumhvørvinum.

Upprunaliga var Rannvá meldað til í bæði skeet og sporting, men síðani er skjótingin hjá kvinnum í skeet dottin niðurfyri, tí ov fáar tilmeldingar vóru, so hon fer bara at skjóta í sporting.

## Skjúttarnir væl fyri

Umframt hana eru so fýra menn á føroyska liðnum. Magni Dam og Jóannis Joensen eru við í skeet og Eirikur Elisson og Rúni Debes skjóta trap. Haraftrat eru Magni og Jóannis eisini við í sporting sum einstaklingar, umframt at Rúni verður saman við teimum í liðkappingini í sporting.

– Eg haldi, at vit hava eitt gott lið hesa ferð, sjálvt um saknurin sjálvandi er stórur av Mariusi Joensen, sum plagdi at vera toppskjútti, men er burturi og siglir og tí ikki fær komið við, sigur Johnhard Klettheyggj, formaður í byrsudeildini í Skjótisambandinum.

– Vónirnar eru hampuliga góðar, tí okkara skjúttar eru væl fyri og venja dúgliga. Higartil hevur verið vant bæði í Sundalagnum og á Sandvíkum, men nú meira ferð kemur á venjingina, venja skeet-skjúttarnir í Sundalagnum og trap-skjúttarnir á Sandvíkum.



### Byrsuskjúttarnir

| | |
|---|---|
| Rannvá Eiriksdóttir | sporting |
| Magni Dam | skeet og sporting |
| Jóannis Joensen | skeet og sporting |
| Eirikur Elisson | trap |
| Rúni Debes | trap og sporting |

# Rødgaard tryggur Grand Prix vinnari í Vestmanna

**Altjóða meistarin, IM John Rødgaard, gjørdi bart, tá hin 9. Grand Prix kappingin í kappingarárinum 2008/09 varð telvað í Vestmanna flaggdagsmorgun**

TALV
*Jóanis Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*

Talan gjørdist, samanumtikið, um ein sera tryggan sigur. Lyklaorrustuna ímóti IM Helga Dam Ziska varð vunnin trygt í 5. umfarinum og varð harvið størsta forðingin skúgvað til viks, til tess at náa oddin.

Rødgaard telvdi sigurin til høldar uttan tap og vann kappingina við 6½ stigi av 7 møguligum. IM Helgi Dam Ziska gjørdist nr. 2 við 6 stigum, meðan Torkil Nielsen vann 3. plássið við betri korrektión móttvegis Hjalta Toftum Jógvansyni, sum somuleiðis endaði á 3. plássinum, eisini við 5 stigum.

Oddurin gjørdist aftur hesuferð á leið sama myndin, sum í fleiri av undanfarnu 8 Grand Prix umførunum. Og aftur hesuferð argaðu 16 ára gomlu javnaldrarnir, Hjalti Toftum Jógvansson og Rógvi Egilstoft Nielsen, oddin. Løturnar har Rødgaard av álvara var á vandaleið, var júst ímóti hesum báðum unglingunum. Hetta myndaði seg ikki minst í javnleikinum hjá Rógva í seinasta umfarinum og har Hjalti koppaði Finnbjørn Vang.

Kappast varð somuleiðis um styrkisvirðislønir.

Ivaleyst væl upphitað frá NM fyri gentur í Stokholm farna vikuskifti, telvdi Sára Traber Olsen eina einastandandi góða kapping. Gjørdist nr. 8 av teim 22 luttakarunum og vann 2. styrkivirðisløn við 4 stigum. Ivaleyst væl inspirerað av upprunanum úr Vestmanna !

Jón Andreasen var bestur fyri telvarar við styrkitalinum 1700 og lægri, skrivar Talvsambandið á heimasíðu síni.